## DAGSINS MEINING

### Tøgn um kjarnuna -góla um kókaðu hønuna!

Løgmaður skal nú kanna framferðina, ella atburðin, hjá landsstýrismanninum í mentamálum í Løgtinginum síðsta fríggjadag, men Torbjørn Jacobsen kann óivað taka tað róligt, tí kanningarnar hjá løgmanni higartil hava tikið so langa tíð, at valið er kanska farið fram við, áðrenn ein niðurstøða verður gjørd í løgmansfyrisitingini.

Tað var í málinum at skipa Útvarpið og Sjónvarpið sum tveir almennar stovnar, at Torbjørn Jacobsen gjørdist heldur bondskur á málinum, tí mentamálanevndin mælti til, at málið varð tikið aftur. Tað skal ikki forsvarast, at landsstýrismaðurin kallaði ein av hægstu embætismonnunum, landsgrannskoðaran, fyri ein “gemenan bókhaldara” ella at hann fór illa við einum nevndaráliti.

Afturímóti tykist tað tó at vera burtur úr vón og viti at umhugsa at reisa misálit á ein landsstýrismann fyri nøkur orð, sum átti at verið ósøgd. Tað eru fleiri skræðugákur, sum frá tingsins røðarapalli hava brúkt verri og meiri niðrandi orð enn hasi. Men mentanevndin gjørdist kanska firtin, tá landsstýrismaðurin helt, at álitið í málinum minti um eina “kókaða hønu”? Í so erkvisið!

Aafturímóti undrar tað, at eingin løgtingslimur hevur sett spurnartekin við áskoðanina hjá landsgrannskoðaranum og gjaldstovustjóranum! Hvat siga løgfrøðingar til málið og til tulkingina hjá teimum báðunum? Tað er óivað ein løgfrøðingur, sum hevur evnað uppskotið endaliga til í Mentamálastýrinum! Eisini hevur tað verið gjøgnum løgfrøðiligu nálareyguni í Lógardeildini og á Løgtingsskrivstovuni! Hvør sigur, at landsgrannskoðarin altíð hevur rætt, tá hann viðger heimildarspurningar?

Harafturat undrar tað, at eingin løgtingslimur alment hevur tikið kjarnuna í málinum upp í bløðum ella almennu fjølmiðlunum! Tora tey ikki, ella hava tey einki upp á hjarta í hesum máli, sum hevur rættiliga stóran týdning fyri frælsi og fólkaræði! Tøgnin og støðutakanin hjá mentamálanevndini kann fáa onnur uttanfyri at gera ta niðurstøðu, at almennu fjølmiðlarnir skulu liggja undir beinleiðis politiskar stýring, sum teir gera nú. Sum er, er einki vatntætt skott - sum er nógv umrøtt í samband við bygnaðarbroytingarnar - ímillum landsstýrismannin og loftmiðlarnar! Tað er fyrst og fremst her, at kjarnin er í uppskotinum, og sum útvarpsstjórin so greitt vísti á í eini grein í bløðunum fríggjadagin, tá hann spurdi, um Løgtingið vildi hava eysturevropeiska støðu at galda i Føroyum! Ein álvarsamur spurningur, sum eingin hevur afturvíst!

**Sosialurin**

# Hvat vil verandi samgonga við Suðuroy





**Týsdagin 2. mai 2001 hoyrdist, at landstýrismaðurin í vinnumálum Bjarni Djurholm hevði svara einum fyrispurningi í Løgtinginum um, at berghol millum Øravík og Hov ikki bleiv gjørt í bræði, men kanska einaferð í framtíðini.**

FÓLKAFLOKKURIN ÍMÓTI SUÐUROYARSKIPI.

Nú hugsi eg og nógvir suðringar við mær, um hetta aftur er ein roynd frá samgonguni við fólkaflokkinum á odda, at minka um eitt nýtt suðuroyarskip.

Tað hevur verði eyðsýnt, at landstýrismaðurin Bjarni Djurholm vildi hava eitt minni suðuroyarskip, og hann segði eisini, at hann hevði allan fólkaflokkin aftanfyri seg, so viljin frá fólkaflokkinum tykist ikki at verða stórur fyri at stuðla útjaðarinum, sum Suðuroy er ein partur av.

Einki berghol, eingin samferðsluhavn og minni suðuroyarskip.

Tá ið berghol millum Øravík og Hov nú blívur raðfest aftarliga av samgonguni, mugu vit í Suðuroy spyrja, hvar skal tilfarið til eina samferðsluhavn koma frá?

Vil samgongan yvirhøvur gera nakra samferðsluhavn?

Um eingin samferðsluhavn verður gjørd, ja, so blívur tað ikki ta suðuroyarskip, sum allir suðringar og strandferðslan vil hava.

**Undirstøðukervið.**

Suðuroyggin er afturútsilgd viðvíkjandi undirstøðukervinum og um viljin at útbyggja hetta kervið í og til Suðuroy ikki er til staðar hjá verandi mynduleikum, so mugu vit, sum búgva her, gera alt hvat vit eru ment, at broyta hesa skeivu mannagongd.

Undanførslurnar frá verandi samgongu um íløguætlan, kunnu vit í Suðuroy ikki brúka til naka sum helst, tí støðan í Suðuroy blívur ikki betri av tí og bara lata standa til, kunnu vit heldur ikki, tí vit vita, at vit eru afturútsilgd og mugu tí brúka øll hyggjuráð fyri at koma á hædd við hin partin av Føroym.

**Somu sømdir.**

Vit vilja hava rætt til at búgva her, og vit krevja, at samfelagið bjóðar okkum í útjaðarinum somu sømdir og vælferðartilboð, sum fólk í miðstaðarøkinum fáa.

At hava stórt yvirskot í landskassanum og lata útjaðarin spakuliga doyggja, kunnu vit ikki góðtaka.

*Tvøroyri, tann 6.mai 2001*

*Finnleif Guttesen*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.





DAGFØR
TEG
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin


## VIÐMERKINGAR

# Rottufelluprinsippi



VIÐMERKING
*Regin Eikhólm*

**“Fólkaatkvøðan” hjá samgonguni byggir nú á rottufelluprinsippið – gloymd eru lyftir um breiðan meiriluta a la íslandska leistin!**

Var “Jeppe på bjerget” meira tilvitandi enn samgongan? Tað gingu jú útvið trý ár áðrenn samgongan stillaði sær sjálvum spurningin hjá Jeppe: “ Droymi eg ella eri eg vakin”? Men løgmaður vaknaði við kaldan dreym, tá Fynd purraði út við eini meiningarkanning, sum vísti, at bert 2/5 av Føroya fólki tóku undir við loysingarproklamatiónini frá 1. februar 2001, meðan 3/5 søgdu nei.

Fyrsta burturbragdið var at útnevna Nyrup til “óeydnismannin” umborð á fullveldisskútuni og síðani ideologiskt at blaka Nyrup fyri borð – eins og ein annan Jónas. Fullveldisskútan kundi síðan trygt halda sína teatralsku fullveldiskós.

Eisini seinasta meiningarkanning hjá Fynd vísir, at tað framhaldandi er meiriluti fyri at Føroyar eru í ríkisfelagsskapinum. Hinir hypotetisku spurningarnir um blokkin og fullveldið kunnu fólk reelt ikki fyrihalda seg til, uttan so at tey samstundis sleppa at taka støðu til fylgirnar av eini møguligari loysing.

### Frælsi er ábyrgd?

Frælsi ella fullveldi er eingi trygd í sjálvum sær fyri, at ein vísir ábyrgd,og mong eru dømini um at tann sum umsitur “frælsi” mangan ábyrgdaleyst hevur gjørt sær dalt av hesum. Hugsið bara um allar valsharrarnar sum gjøgnum tíðina hava tikið sær frælsi til ábyrgdaleyst at gera sum teimum lysti. Samgongan hevur sjálv tikið sær frælsi til at renna frá givnum lyftum um demokratiska framferð við breiðum meiriluta, tá málið um nýskipan kom fyri. Frágreiðingin um 80-árini vísir eisini, at tað ikki var tvørrandi frælsi, men ábyrgdaloysi sum var høvuðsatvoldin til miseruna, bert fyri at nevna nøkur dømir.

Afturvendandi útsagnið hjá varaløgmanni, at “frælsi er ábyrgd”, er uttan reelt virðið, og eitt innantómt útsagn hvørs einasta endamál er at billa fólki inn, at saman við fullveldinum fáa vit øll veingir! Hetta er tíverri av somu skuffu sum “arbeit macht frei” hugtakið — rein propaganda.

Nationalisma og politisk maktgyrnd er ein farligur cocktail um tað verður til ein hugburð, har “målet helliger midlet” og etikkurin í samskifti við onnur er heimagjørdur. Onkur pallmynd hjá Prix Føroyar var longu fongd við hesum hugburði. Stórt spell í einum annars góðum tiltaki.

### Persónliga frælsi

Sambært sakkønum verður persónliga frælsið við fíggjarligum rásarúmi munandi skert og livifóturin lækkar við 20 — 25%, um vit velja at standa uttanfyri ríkisfelagsskapin. Teir 1520.000 føroyingarnir búsitandi í Danmark sleppa helst at velja ímillum danskan ríkisborgaraskap ella at vera fremmanda-arbeiðarar í Danmark.

Kuba og Albania er góð dømi um lond við fullveldi men lítlum og ongum persónligum frælsi, fyri ikki at nevna londini eystanfyri og í Afrika! Fólk flýggja í túsundavís úr hesum sokallaðu “fullveldum”, kanska tí tey ikki hava okkara propagandaministara at vegleiða seg.

Nútíðar menniskja ynskir fyrst og fremst persónligt frælsið við fíggjarligum rásarúmi. Hetta er eisini tað, sum verður staðfest í altjóða mannarættindarviðtøkunum.

Samgongan kláraði ikki at halda lyftið um breiða semju og enn minni at definernað eina fólkaatkvøðu a la ta íslendsku við 75% sum minstamark bæði fyri luttøku og ja atkvøðum. Tann íslendski leisturin er tí skiftur út við rottufelluprinsippið, har skiftandi lokkumatur og meiningarkanningar skulu avgera nær “fólkaatkvøðan” skal á dagsskránni ella takast av somu.

Vit eiga at hava í huga at konsensusundirtøkan í Íslandi var nóg stór (98%) til at bera felagskapin, men í Føroyum er hon ov lítil (40%) til at bera felagskapin.

### Føroyingurin er ikki íslendari

Føroyingurin er ikki so loysingarhugaður sum íslendarin. Kanska tí vit hava størri samstarvsevnir og fleiri royndir á ríkisfelagsskapsøkinum. Eisini hevur sosiala netverkið millum føroyingar og danir altíð verið tættari enn millum íslendarar og danir. Eitt nú hevur tað mestsum verið siðvenja hjá mongum føroyskum “loysingarmanni” at gifta seg danskt, eins og í fornari aðalbornari siðvenju tá tað ráddi um at savna heldur enn at spjaða lond og ríkir, tí tunt er tað blóð, sum ikki er tjykkri enn vatn?

### “Súla góð” ella “Dani góður?

Í øldir hevur súlan givið Mykinesfólki fjøður og kjøt, men súlan hevði ov lítið fíggjarpotentiali til at binda fólkið til oynna. Kortini verður tann dag í dag av Mykinesfólki sagt “súla góð”. Hinvegin hava føroyingar í øldir í samskifti við danir notið gott av ríkisfelagsskapinum, soleiðis at bæði vælferðin og fólkatalið í Føroyum er munandi økt í hesum tíðarskeiðnum. Frá í fyrstani at vera “de fattige udi Færø” til í dag at vera ein nútímans vælferðartjóð við egnum heimamáli og eini livandi og fjøltáttari mentan. Multipla potentialið í ríkisfelagskapinum hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri menningina í Føroyum.

Men “súlutakksemið” hjá Mykinesmonnum er ókent í hesum samanhangi. Um onkur føroyingur hevði dittað sær at tikið “dani góður” í munnin eins og “súla góð”, so varð hetta helst av ávísum roknað sum eitt quislingaútsagn! Tað nærmasta vit koma “súlutakkseminum” á hesum øki er helst tá ellisrentan kom, og ein gamalur maður skal hava sagt, at staturin var ein góður maður!

At danir stuðla Føroyum, tí teir ynskja ræðisrættin yvir menningini í Føroyum, bleiv longu í 1968 av Anders Ølgaard, professara sagt at vera ein ógrundað hypotesa (Færinger Frænder s. 170), og higartil er ikki nakað sum hevur falsifiserað hesa niðurstøðu. Tað at ein nýggj meiningarkanning í Danmark vísir, at bert 18% av dønum hava áhuga í ríkisfelagsskapinum, byggir undir orðini hjá Anders Ølgaard, professara. Nógv bendir eisini á at danir á henda hátt taka avstand frá óseriøsu og nationalistisku framferð varaløgmans. Kanska føla danir at teir longu í ov langa tíð hava verið “tossegod”.

Tá útlendskt — ikki danskt — oljufelag herfyri doneraði Fróðskaparsetrinum 5 mill. krónur oyramerktar til gransking og útbúgving innan fyri egið áhugaumráðið, var pressan væl umboðað og hálovingin var ófør, meðan tær 100 tals mill. krónur sum danska samfelagið árliga letur til føroysk áhugamál fáa skam og last, skil tað hvør í vil?

### Er orsøkin føroysk søgureingjan?

Kanska er svarið at finna í Dimmalætting 11. apríl 2001. Undir heitinum “ Føroysk søgureingjan” skrivar Anja Andreasen, BA í søgu og siðsøgu, um einstáttaðu uppfatanina hjá føroyskum tjóskaparfólki av okkara fortíð, tí uppfatanin í alt ov stóran mun er ávirkað av føroyskari søgureingjan.

Rætt er tað, at vit hava eina stóra yvirvág av søgubókum skrivaðar við loysingarbrillum á nøsini, og eina Hvítubók har fyrimunirnir í ríkisfelagsskapinum eru endurgivnir ígjøgnum ein “Nelson- kikara”

Í hesum samanhangi er als ikki neyðugt at hava lisið Søren Kierkegaard fyri at finna útav, at sannleikin er subjektivur!

Onkur hevur eisini longu skotið upp, at vit høvdu sloppið undan nógvum villleiðandi og niðurbrótandi loysingartosi, um Føroya søga í nýggjari tíð hevði verðið endurskoðað og skrivað av nýggjum uttan tað alt dominerandi loysingarsyndromið. So her liggur kanska ein avbjóðing til okkara søgufrøðingar?

Ein Hvítabók uttan “Nelson-kikaran” hevði eisini víðka sjónarringin!

Men mangt broytist á mansins ævi, og í verandi loysingarrúsi, har Rúna Siversen, fólkafloksumboð á tingi og Jóanes Nielsen, yrkari og samfelagsrevsari, reiða sær felags tjóðskaparból, er spurningurin nærliggjandi: “Hvussu leingi lá Jeppe í song barónsins”?

*Takk fyri upptøkuna.*